

*Her eru eg og pápi mín í 1949 inni í tí Gomlu Føringahavnini. Húsið til vinstru á myndini við C. 7 mála á takinum, er hospitalið. Húsið aftan fyri okkum, mitt á myndini er Telegrafstøðin*



*Í 1951. Her eru vit uppi á einum ísflaka. Sum tað sæst er víkin full av ísi. Frá høgru síggjast Tórolv, Olivur, Steintór, Magnus og Vermund*

Føroyingahavnina í øllum góðum og gjørdu onkur ørindi har. Síðani varð farið longur norður til fiskiskap. Vit vóru millum annað í Norðaru Føroyingahavnini. Henda havn bleiv av fyrstan tíð ávíst føroyingum, men bleiv lítið og einki brúkt. Í Streymfjørðinum vóru vit eisini. Har inni lá ein portugisisk skonnart við trimum mastrum sokkin. Hon var farin á land, og var sleipað av aftur. Men hon hevði fingið so stóran skaða, at hon sakk. Mastrarnar komu uppundan. Eg minnist, at onkur av okkum ungu vóru uppi yvir henni.

Thorvald Hjelm úr Vági hevði verið við Borgini og roynt at bjarga, men til fánýtis.

Úti í Streymfjarðardýpinum royndu vit eisini eina tíð, men tað bar lítið til.

Vit royndu so langt úr landi, so tað var ógjørligt hjá bátunum at sigla til lands, so skipið mátti liggja úti á feltinum.

Tá ið so sjaskveður bleiv, komu vit í neyð av bátunum. Eg minnist eina ferð tað var sjaskveður. Tað varð roynt at taka bátarnar inn. Spælkraftin var góð. Men tað verra var, at tá ið báturin loysnaði úr sjónum, fór hann at sveiggja, so alt mundi farið í knús, og mannskaði mundi staðist av tí. Vit fingu ein bát á dekkið á henda hátt, og so var farið at sigla til lands.

Á ferðini inn var tað um reppið, at vit mistu bátarnar, sum hingu í einum longum sleipitrossa aftur úr skipinum. Hetta var ikki roynt aftur.

## Funnu ikki skipið aftur

Eftir hetta lá skipið altíð í onkrari havn. Einaferð lógu vit sunnan fyri Atamik ella Napasok. Har lógu eisini einar tvær skonnartir. Borgin úr Vági var so onnur.

Eitt leygarkvøld var so funnið uppá at fara ein túr norður til bygdina. Vit fóru við tveimum bátum. Hin báturin var fýramannafarið úr Vági. Tað var hópin langt at sigla, meira enn ein tími. Fyrst vit sóu ljósini frá bygdini, gjørdi báturin eitt lop tvørtur um eitt sker, men tíbetur hendi einki. Tá ið vit skuldu fara avstað aftur, vóru ikki allir komnir til bátin, men eg var tó komin. Hin báturin lá klárur at fara. Ein ungur vágbingur, Valdemar, sum var við tí bátinum, spurdi um eg ikki bara kom við teimum, og tíbetur tók eg av.

Vit fóru so avstað, og tað var langt at sigla. Tá ið vit fingu eyga á skipið, køvdi hann av í mjørka, og tað var næstan blivið myrkt.

So tað vóru ikki góð útlit fyri hinum bátinum at finna skipið aftur. Tað mundi ganga út ímóti tveimum samdøgrum, og eingin bátur kom aftur. So vónirnar vóru ikki góðar, og tað var ringt lag umborð.

Tá kom sinnið í skiparan, og gamli avgjørdi at hiva inn, og so var farið avstað. Hann mundi sigla í einar fýra tímar til havs. Tá fór fyrsti meistari uppá brúnna og spurdi skiparan, um hann visti, hvat hann gjørdi, og um hann ikki visti, at hann hevði skyldu at sóknast eftir monnunum, áðrenn hann rýmdi. Tað bleiv siglt eina løtu afturat. So bleiv vent. Tá ið vit tá komu aftur í havnina, fingu vit at vita, at teir vóru komnir um borð á Borgina. Hon var ein trýmastrað skonnart, sum Thorvald Hjelm úr Vági átti og førdi. Teir komu so umborð aftur, og einki meira bleiv sagt um tað.

Men menninir vóru illa á holdum komnir, tá ið teir at enda komu umborð á Borgina.

## Fiskurin svam omaná

Vit royndu so nakað norðanfyri, men lítið bar til. Men so kallaði Sofus við Hvilt, skipari á donsku skonnartini Vegu, á okkum. Teir lógu í Ravns Stóroy og søgdu frá nógvum fiski.

So varð farið suður í Ravnoynna, og har treyt ikki fiskur. Hann svam oman á tað mesta av tíðini, og tað vóru nógvir dagar, at bátarnir fingu fýra ferðir upp í. Tað var stutt at rógva á fiskileið, um hálvur tími úr havnini og norður ígjøgnum Bjarnasundi.

## Fingu íblástur at rógva frá landi

Hetta heystið vóru vit ein túr í landi í Ravnoynni. Í einum skúri stóð ein bátur, sum hevði staðið líka frá 1939. Hetta var ein seksæringur og var heilt stórur bátur í mun til teir, sum vit brúktu.

Pápi mín fekk so stóran áhuga av hesum at fara undir útróður frá landi í Grønlandi.

Hann tosaði við Aksel Thorsteinson úr Vági, sum var við okkum, um at stovna eitt útróðrafelag, sum skuldi reka útróður í Grønlandi.

Hetta var Aksel við uppá. So varð farið at kanna, hvør ið átti henda góða bát. Tað vísti seg so, at Eli Mortensen av Tvøroyri og aðrir áttu bátin. Fjarrit var sent til Eli um at fáa bát og skúr til keyps.

Tað kom svar aftur við tað sama, at tað var í lagi. Prísurin var 12.000 krónur. Hetta boð varð góðtikið beinanvegin. Motorur var eingin í bátinum, har hann stóð, men Eli útvegaði ein sama slag motor, ein Sleipner, sum fylgdi við í keypinum.

## Útróðrarmenn fluttir sum kríatúr

Nú koma vit fram til 1950. Nú varð so farið at fyrireika útróðurin fyri komandi summar. Mogens S. varð nú leigað til ferðina yvir til Grønland. Bátar, fólk, salt og onnur útgerð skuldi flytast við. Teir flestu bátarnir vóru jú í Føroyum. Eg minnist bara tveir bátar, sum vóru har yviri. Teir vóru Bogi, sum æt eftir soninum hjá Eli, og ein funningsbátur.

Skipið var nærum fult av salti, og í somu last skuldu útróðrarmenninir vera. Skipið hevði einki millumdekk. Fyri at hetta kundi lata seg gera, varð saltið javnað út oman á og út ímillum skerstokkarnar.

Nú bleiv ein presending breidd yvir saltið, og madrassurnar lagdar omaná.

Tað var so trongt ímillum salti og lúkurnar, at man ikki fekk staðið upprættur. Og hiti var eingin.

Seinni høvdu skipini, vit ferðaðust við, millumdekk. Tá var mann atskildur frá farminum. Eitt borð var sett á niðaru lúkuni til at skaffa á. Harnæst var ein presending spent upp undir ta ovaru lúkuna og dekkið sum eitt hválv, so at tað ikki skuldi dryppa niður á fólki. Stórir kassar sum góvu tað út fyri kømur við seks koyggjum og elovni á hvørjum kamari. Hetta var eitt harralív í mun til, tá vit byrjaðu. Tá hoyrdust menn siga, at hetta ikki var lív fyri menniskjur, men soleiðis broytast tíðir.

Nú varð so farið norður til Havnar at mynstra og taka proviant og aðra útgerð. Eisini skuldu takast teir bátar og teir menn, sum komu við norðanfjørðs.

## Vildu hava trygd

Tá ið vóru komnir á Havnina og skuldu fara avstað, vísti tað seg, sum rímuligt var, at fólkið ikki vildi fara avstað, uttan at teir fingu eina ella aðra trygd fyri, at familjurnar heima kundu hava nakað at liva fyri, meðan mennirnir vóru burtur. Teir, sum sigldu við skipunum, høvdu avtalu við reiðararnar um, at familjan kundi keypa uppá borg, meðan teir vóru burtur. Hesar møguleikar høvdu vit ikki, tí at eingin stóð aftan fyri okkum. Pápi mín og Aksel Thorsteinson fóru so at tosa við landstýrið um tað ikki var ein møguleiki at gera eina avtalu, so tað bar til at sleppa avstað.

Skipið lá fult av útgerð og bátum, og nógv fólk var komið saman til at fara avstað.

Andras Samuelsen, Jóan Petur Davidsen og Kristian Djurhuus vóru í landstýrinum tá.

Fingið var so í lag, at vit fingu forskot og minstuløn. Lógin um hetta var í umbúna, men ikki komin í gildi. Ein slík varð lógfest í 1951.